


*Hesin vinnarabilurin hjá Michael Schumacher var sýndur fram á básinum hjá Føroya Shell á fiskivinnustevnuni »North Atlantic Fish Fari« í síðstu viku*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Ferrari hjá Schumacher á Fiskivinnustevnuni

Vinnarabilurin í 2003 hjá rasarakoyraranum Michael Schumacher var við á básinum hjá Føroya Shell á fiskivinnustevnuni »Nort Atlantic Fish Fair« á Hjalla

Talan er um ein Ferrari F 2003GA. GA stendur fyri Gianni Agnelli, navnið á Fiat stjóranum, sum doyði í januar mánaði 2003.

Fiat-konsernin eigur Ferrari bilverksmiðjuna og áttu t. d. eisini fólbóltsfelagið Juventus.

Bilurin eigur at hava ein 3.0 litur V10 motor við 850 hk/7 gir. Men eingin motorur er í framsýningarbilinum, sum var á Hjalla.

Tá bilurin er koyriklárur við brennievni og bilførara, vigar hann einans 600 kg.

Bilurin er 4 54,5 cm langur, 179,6 cm breiður, og 0,959 høgur.

Á framsýningini var eisini ein Ferrari-spæliautomat, brennievnistøð og eitt eykahjól til bilin, so tey vitjandi kunnu royna hvussu nógv hjólið vigaði.

# Mini XXL limousina

**Longdar limousinir hava higartil verið eitt sereyðkenni fyri USA, men til Olympisku leikirnar í Grikkalandi í fjør høvdu BMW gjørt ein longdan Mini við innbygdum svimjihyli og trimum akslum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Til Olympisku leikirnar í Athen í fjør varð hendan Mini XXL limousinan við innbygdum svimjihyli nýtt til OL-luttakarar, ið vitjaðu Mini Galega Club sunnan fyri Athen.

Bilurin er 6,30 m langur og bygdur yvir Mini Cooper S. Hann er umbygdur hjá eini fyritøku í Los Angeles, har serfrøðingar í at uppbyggja limousinir hava gjørt bilin, sum hevur fingið ein triðja aksil og hevur sostatt 6 hjól.

Innan er bilurin eins væl útgjørdur, og tær luksus limousinir vit kenna frá t. d. amerikanskum filmum.







*Mini XXL Limousinan er 6,30 m long við 6 hjólum og innbygduu svimjihyli*